Tórshavn 24. februar 2009

Att: Føroyskt Hetlendskt Vinafelag

c/o Erhard Jacobsen

Boks 3081 - FO-110 Tórshavn

Frá: Smyril Line - Jákup Sverri Kass

Góðan dagin, Erhard og takk fyri teldupostin. Eg skilji væl at tit harmast um at Smyril Line ikki longur hevur Hetland við í ferðaætlanini. Atlantic Airways tók táttin upp, men sum skilst, so fáa teir ikki hetlandsflúgving at hanga saman.

Tíverri var ikki grundarlag fyri at Smyril Line framhaldandi kundi sigla uppá Hetland. Vit høvdu nakað av føroyingum sum silgdu við til og frá Hetlandi um summari; men tíverri gekst sera illa við at fáa hetlendingar at sigla hendanvegin.

Eitt annað sum gjørdi siglingarleiðina enn verri var at vit høvdu uppbygt heilt fitt at ferðing til og frá bretska meginlandinum úr Aberdeen við Northlink – og umvegis Hetland til Føroyar og Íslands. Vit høvdu eina sokallaða "alotment" avtalu við Northlink. Hetta merkir at vit høvdu altíð tryggja eitt minimum av plássið umborð á teirra skipum sum silgdu til og frá Hetlandi til Aberdeen. Hetta er vanligt í ferðavinnuni og serliga hotellini brúka alotment til tess at operatørar eins og Smyril Line kunnu tilrætta leggja kampagnur og prísir.

Alotmentavtalan gjørdu at vit kundu til rættaleggja kampagnur og pakkar til Føroyar og Íslands umvegis Hetland og selja teir í Bretlandi.

Tíverri fyri Smyril Line valgdi Northlink at uppsiga hesa avtalu í 2005; og hetta merkti at tað bleiv ómøguligt hjá Smyril Line at fara út við tilboðum tí, at vit vistu ongantíð um vit fingu pláss og eiheldur hvat prísurin bleiv. Umframt at uppsiga sáttmálan fóru Northlink at arbeiða við flótandi prísum. Hetta merkti at prísurin á ferðum ongantíð var tann sami.

Eg vil enda við at siga at um so er at nýggjir møguleikar vísa seg, so er Smyril Line sjálvandi við uppá at taka málið uppaftur, men sum er síggja vit ikki møguleika fyri hesum.

*Vinarliga/Best regards*

**Jákup Sverri Kass**
Sales and Marketing Director
Dir. +298 34 59 31 / +298 21 59 36